# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jóna Rasmussen 60 ár



Í dag, hósdagin 6. apríl, verður Jóna Rasmussen í Havn 60 ár. Hon hevur nógvu tey seinastu árini luttikið í mentanarlívinum – í tónleiki, sangi og sum listarmálari og serliga grafikari.

Foreldrini hjá Jónu vóru Pavla og Jens Guttesen, sum bæði vóru havnarfólk. Tey bygdu úti í Grønlandi, og Jóna vaks upp í Torfinsgøtu. Børnini hjá Pavlu og Jens eru Jóna (1946), Katrin (1947), Gunrið (1950) og Jens Christian (1955).

Jóna var ein av ellivu málsligum studentum í Hoydølum í 1966 – átta dreingir og tríggjar gentur. Síðani lærdi hon til laborant á Landssjúkrahúsinum og í Keypmannahavn. Jóna arbeiddi eitt skifti sum laborantur. Men nógvu tey seinastu árini hevur tað serliga verið listin, sum hon hevur verið upptikin av.

Jóna hevur gjørt skulpturar, teknað og málað við olju. Serliga hevur hon fingist við grafikk. Heima við hús hevur hon væl útgjørdan verkstað, og hon fylgir væl við í nýggju tøknfrøðisligu møguleikunum, sum alla tíðina taka seg upp innan grafikkin.

Í Myndlist í Føroyum, sum kom út í 2000, sigur Bárður Jákupsson um Jónu, at hon er tann í Føroyum, sum hevur fingist eina mest við grafisku listina og serliga metal grafikkin. Fyri seks árum síðani varð hon í hesi bókini søgd at vera fjølbroytin og leitandi.

Hóast Jóna so at siga altíð hevur verið upptikin av listini, og hevur teknað og málað, so var tað lutfalsliga seint, at hon fór at sýna fram alment. Tey seinnu árini hevur hon verið rættuliga virkin.

Síðani 1990 hevur hon sýnt fram á ólavsøkuframsýningini og várframsýningini, hon hevur havt og verið við í framsýningum í smiðjuni í Lítluvík, Norðurlandahúsinum og í Listarskálanum, har hon í 1999 einsamøll hevði stóra framsýning. Uttanlands hevur Jóna saman við øðrum sýnt fram á fleiri støðum í Keypmannahavn, Helsingør, Hirtshals, í Sønderjyske Kulturcenter sum var í Vojens, í Kolding, í Arendal, í Baltikum og í Reykjavík.

Jóna undirvísir í grafikki í kvøldskúlanum, hon er nevndarlimur í LISA, og hon hevur fleiri ferðir verið í upptøkunevndini í sambandi við várframsýningarnar.

Jóna giftist í 1970 við Ingolfi Rasmussen úr Søldarfirði. Hann er sjómaður, og í mong ár var hann nógv avhildin trolaraskipari í Grønlandi. Í 1971 fluttu Jóna og Ingolf til Pamiut ella Frederikshåb, sum tað áður varð nevnt, at búgva, og har vóru tey í eini sjey ár. Síðani hava tey búð í Torfinsgøtu. Ingolf hevur siglt, og at hann umframt at fáa fisk eisini hevur góðar gávur at hugna um sæst bæði uttandura og innandura í snotuliga heimi teirra.

Jóna og Ingolf eiga tvey børn. Jens Pauli er føddur í 1971, og Sigrið er fødd í 1975.

Jóna er runnin av musikalskari rót. Hon hevur altíð spælt upp á guitar og onnur streingjatól. Nógvu tey seinastu árini hevur hon serliga havt tokka til tvørfloytuna, sum hon eisini hevur spælt upp á í Føroya Symfoniorkestri. Hon syngur í sangkórinum í Ebenezer og í trible trioini. Í morgun var vakur sangur at hoyra uttanfyri hjá Jónu og Inglofi. Tá ið hon fyrstu ferð sá dagsins ljós fyri seksti árum síðani, var stórkavi, og aftur í morgun var foldin hvít.

Í kvøld er opið hús í Torfinsgøtu 42.



# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
í stóru sorg okkara, tá høgt elskaði sonur okkara,
beiggi, ommu- og abbasonur

**Ernst Wesenberg Sivertsen**
Hoyvík

so tíðliga bleiv kallaður heim til Harran.

Tøkk til Bergur D. Joensen prest, fyri troystarrík
og góð orð í heiminum og kirkjuni.
Tøkk til tykkum øll, sum bóðu fyri Ernst og okkum,
tykkum sum vitjaðu okkum bæði á Ríkissjúkrahúsinum
og heima, tykkum sum ringdu, skrivaðu
og sendu heilsanir á ymiskan hátt.
Tøkk til tykkum, sum gjørdu tað møguligt hjá okkum
at verða heima við Ernst í millum viðgerðir
og tað seinastu tíðina.
Tøkk til sangarar, kirkjutænarar og vakran einstakan
sang í kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur
til Krabbameinsfelagið.
Tøkk til tykkum øll, sum skipaðu fyri ervinum
og hjálptu til við jarðarferðini, tykkum í Oasuni
og ikki minst til Hoyvíkar Skúla.
Hjartans tøkk øll somul.
Tøkk til hvønn einstakan av tykkum
í tí stóru mannfjøld , ið fylgdu Ernst
á hansara seinastu ferð her á fold.
Má Harrin signa tykkum øll.

*Familjunnar vegna*

**Ann Mari, Hans Jákup, Rani, Andreas og Maria**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
og hjálpsemi, tá høgt elskaði maður, pápi, verpápi
og abbi okkara

**Gunleigur Poulsen**
Klaksvík

brádliga varð tikin heim til Harran.

Hjartans tøkk til tykkara, sum komu inn á gólvið,
tykkum sum ringdu, fyri blómur, gávur og heilsanir.
Tøkk fyri peningagávur til Emmaus.
Tøkk til prest og talarar, fyri góð og troystarík orð
og tøkk til tykkum mongu, sum vóru við
til jarðarferðina.
Ein tøkk til samkomuna í Emmaus,
fyri stjóru hjálp tykkara.
Hjartans tøkk og Harrin signi tykkum øll.

*Familjunnar vegna*
**Ella**
**Hjørdis, Dánial og Heidi**

# Tøkk

Eg vil takka fyri sýnda samkenslu tá mín góði pápi
og verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Jakob Oluf Jakobsen**
vanliga nevndur Mester
Fuglafjørður

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum vóru í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og øll tykkum,
sum á annan hátt vóru um okkum,
ein serlig tøkk til tín Anna.
Vit takka fyri blómur, kransar og peningagávur
til Parkinsonfelagið.

*Við ynski um einar gleðiligar páskir*

**Birgit, Òla Chr., Súsanna, Njal, Poula, Bogi, Fríði og Jenny**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Bina Svartá, Saksun**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 5. apríl, 93 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Kistan við **Dávur Daviden, Nes**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hós dagin kl. 16.00. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni fríggjadagin kl. 14.00.

Kistan við **Jóhan Mørkøre, Hósvík**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin 6. apríl, kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Hósvíkar Kirkju fríggjadagin kl. 14.00. Tey, ið vilja minnast Jóhan, kunna lata Leguhúsinum í Nesvík eina peningagávu; konta í peningastovnunum.

**Alice Hansen, Rituvík**, andaðist í heiminum mikukvøldið 5. apríl, 70 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Kistan við **Hans Jákup Hansen, Tórshavn**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin 6. apríl klokkan 20.00. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkjuni fríggjadagin kl. 13.00.

**Gerda Drangastein, Haldarsvík**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 5. apríl, 77 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Haldarsvíkar kirkju leygardagin kl. 14.00.

**Ted Scheiner**, maður Astrid í Dalinum, andaðist 28. mars í **Dorset** í Onglandi, 84 ára gamal. Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 15.00 í Pool

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæra
mamma, omma, langomma og olduromma

**Anna Maria Mikkelsen**

*vanliga nevnd Mia á Støðini*
Syðragøta

andaðist í heiminum týskvøldið 4. apríl,
100 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Filadelfia 8. apríl kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Tórur, Katrin og Marjun**

Tey, ið ynskja at minnast Miu, kunnu lata eina peningagávu til Filadelfia í Gøtu, konta í Føroya Banka.